# So slepst ikki longur norður

FERÐAMANNASKIP

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Svalbard, Sosialurin: Myndin sýnir eitt ferðamannaskip, sum liggur við bryggju í Longyearrbýnum á Svalbard. Ferðamannaskipið hevur verið í Føroyum og hetta er norðasta plássi tað kemur til. Myndin er tikin úr flogfari undir innflúgvingini til flogvøllin í Longyearbýnum, aftan á eina útferð á Svalbard. Tá vit vóru komin á hotelli, vóru touristar at siggja allastaðni og í handlunum stóðu fonggladir keypmenn og frøddust yvir hesar »idiotarnar« sum keyptu reindjóraskinn, kópa og ísbjarnaskinn at hava við sær heim aftur í stovurnar niðri á meginlandinum.

Tað er fullkomiliga bannað at veiða ísbjarnir á Svalbard, men dupultmoralur er dupult so góður og tí verða ísbjarnaskinn innflutt úr Kanada og seld á Svalbard. Hetta stendur einki um á skinninum ella á lepanum sum fylgir við og hvør leggur í tað og kennir mun á eini kanadiskari ísbjørn, ella eini ísbjørn av Svalbard. Eitt ísbjarnaskinn kostar um 40.000 norskar krónur.

Ferðafólkini fara umborð aftur við fullum kneppi av tinganeysti av djórum úr tí villu ísoyðuni og eftir standa keypmenninir og smílast og seta inn á bók.

Ferðamannaskipini eru ein sonn hóttan móti viðkvæmu náttúruni á Svalbard og nú fer sýslumaðurin at seta nýggj tiltøk í verk, sum fara at avmarka møguleikarnar hjá ferðafólki munandi. Náttúran er so viðkvom so norðalaga, at setir tú fótin harðliga í vøllin, so verður fótasporið standandi í mong tíggjuár.



*Ferðamannaskip við bryggju í havnini í Longyearbýnum*
Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Upp í ein strúk av suðri og útsynningi. Skýggjað og út á dagin regn, men út á náttina ælaveður. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi ella vestri. Fyri tað mesta skýggjað og ælaveður. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið fríggjadagin**




**og leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi, seinni minkandi niður í lot av ymsum ættum ella suðri . Skýggjað og ælaveður av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | 19 |
| Halifax | 22 |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 15 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 18 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 22 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 17 |
| Madrid | – |
| Róm | 25 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 29 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 29 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 26 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 29 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Hátrýstið yvir Skandinaviu og Bretsku oyggjunum fer spakuliga í ein landsynning. Eitt lágtrýst yvir Jan Mayen fer í ein landnyrðing.



Eitt lágtrýst sunnan fyri Kappan fer í ein landnyrðingeystan og fer framvið norðan fyri Føroyum hósdagin og fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/08 kl. 06⁰⁰– 25/08 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 12,4°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 14,0 mm – mált frá 24/08 kl. 06⁰⁰– 25/08 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 61,7 mm


**BILLUTIR**



ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

**F.A. BILLUTIR**

tlf. 421605 fax 421666






fæst á apotekunum kring landið


## VESTFALLSKYRRINDI

22. aug.: Fullmáni
26. aug.: Mánin longst frá jørðini
31. aug.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 28. aug | 11.05 | 23.25 | 10.05 | 22.25 | 10.20 | 22.40 | 00.47 | 13.05 | 01.47 | 14.05 | 09.20 | 21.40 | 08.20 | 20.40 | 11.20 | 23.40 | 00.02 | 12.20 | 10.50 | 23.10 | — | 12.05 |
| 29. aug | 11.45 | — | 10.45 | 23.05 | 11.00 | 23.20 | 01.25 | 13.45 | 02.25 | 14.45 | 10.00 | 22.20 | 09.00 | 21.20 | — | 12.00 | 00.40 | 13.00 | 11.30 | 23.50 | 00.25 | 12.45 |
| 30. aug | 00.05 | 12.26 | 11.26 | — | 11.41 | — | 02.05 | 14.26 | 03.05 | 15.26 | 10.41 | 23.16 | 09.41 | 22.16 | 00.20 | 12.41 | 01.20 | 13.41 | — | 12.11 | 01.05 | 13.26 |
| 31. aug | 01.01 | 13.36 | 00.01 | 12.36 | 00.16 | 12.51 | 03.01 | 15.36 | 04.01 | 16.36 | 11.51 | — | 10.51 | 23.27 | 01.16 | 13.51 | 02.16 | 14.51 | 00.46 | 13.21 | 02.01 | 14.36 |

5 707265 100036 >